Marknaðarføra føroysku undirgrundina

Fleiri stór oljufeløg vístu framtíðar leiting við Føroyar áhuga, tá umboð fyri Jarðfeingi herfyri marknaðarførdu komandi 3. útbjóðing, sum letur upp næsta heyst

MARKNAÐARFØRING
Jan Müller
jan@sosialurin.fo

Fyri fyrstu ferð hevur Jarðfeingi luttikið á stórari altjóða framsýning um oljuleiting og útbjóðing av nýggjum leitiøkjum. Og tað er ein væl nøgdur stjóri í Jarðfeingi, sum úttalar seg um tiltakið. Sigurð í Jákupsstovu sigur við Sosialin, at føroyskir oljumyndugleikar hava oftani verið við til altjóða framsýningar og ráðstevnur, men hetta er so fyrstu ferð, at Jarðfeingi hevur havt sín egna bás á stórari oljuframsýning. Talan er um ráðstevnuna "Petroleum Exploration", eisini kallað PETEX 2006, sum verður hildin á øðrum hvørjum ári í London, har flestu av heimsins oljufeløgnum vórðu umboðað sum luttakarar ella vitjandi umframt allur oljuídnaðurin eitt nú seismikkfeløg. Sigurð í Jákupsstovu sigur, at teir hava leitað eftir einum hóskandi stað og er hann sera fegin um at hava verið við á PETEX.

Við á føroyska básinum vóru umframt Jarðfeingisstjóran eisini Súsanna Sørensen, Petur Joensen og Heri Ziska. Teirra uppgáva var at lata vitjandi fáa tilfar um Føroyum og her serstakliga um komandi 3. útbjóðingina, sum verður um eitt lítið ár.



Kortið, sum varð vist fram á oljumessuni í London, vísir økini, sum jarðfrøðingarnir á Jarðfeingi skjóta upp verða við í 3. útbjóðingarumfari. Hetta skal tó fyrst leggjast fyri bæði fiskivinnu- og umhvørvismyndugleikarnar, sum skulu góðkenna økini eins og tað í síðsta enda er løgtingið, ið skal samtykkja, hvørji øki verða boðin út. Kelda Jarðfeingi

Nøgdur

Sigurð í Jákupsstovu er nøgdur við luttøkuna. Har vóru umboð fyri fleiri oljufeløg, sum løgdu leiðina forbí føroyska básin og fingu tilfar. Hann vil ikki upplýsa, hvørji feløg talan var um, men Sosialurin veit frá vælvitandi keldum, at gamlir kenningar so sum ExxonMobile vístu áhuga fyri komandi útbjóðing. Hetta heimsins største oljufelag var upprunaliga millum feløgini, sum gjørdu kanningar í Føroyum undan 1. útbjóðingini í 2000.

- Fyri okkum var tað avgjørt eitt positivt upplivilsi at hitta umboð fyri fleiri oljufeløg sigur Sigurð í Jákupsstovu og vísir aftur, at turri Brugdubrunnurin hevur lagt Jarðfeingi í eina "coma"støðu. -Tað er okkara uppgáva at royna at selja føroysku undirgrundina og í hesum førinum vístu vit útlendsku oljufeløgunum á tey øki, sum kunnu væntast at vera við í komandi útbjóðing.

- Vit fara longur vestur eftir sunnan fyri Føroyar og nakað longur norður eftir eystan fyri framvið markinum. Síðani eru eisini øll tey økini, sum eru boðin út áður, men sum ikki eru vorðin til loyvi. Eisini eru økini frá 1. útbjóðing, sum eru latin inn aftur.

Kapping

Kappingin við onnur umráði hevur eisini týdning fyri eina komandi útbjóðing. Á onkrum økjum eru okkara treytir betri og á øðrum verri enn onnur útbjóðingarøki.

- Vit halda tað hevur týdning alla tíðina at bjóða nýggj øki fram. Nú eru øki latin aftur til okkum, sum vórðu latin í fyrstu útbjóðing. Vit halda tað vera rætt at bjóða hesi út aftur til onnur oljufeløg, sum kanska hyggja eftir teimum við øðrum brillum.

Feløgini arbeiða so eisini miðvíst við loyvunum í 2. útbjóðing. At tey ikki hava gjørt av at bora enn er ikki løgið, tí tey royna fyrst at gera sítt heimaarbeiði til lítar.

- Hetta var so okkara fyrsta veruliga marknaðartiltak. Nú taka vit samanum og fara at fyrireika okkum væl til marknaðarføringina næsta ár sigur ein varisliga bjartskygdur Sigurð í Jákupsstovu, sum so avgjørt ikki hevur mist vónina at finna olju og gass við Føroyar, nú tann fimti brunnurin var turrur.

Oljufeløg mugu fáa betri arbeiðstreytir

-Vit mugu gera tað smidligari og lættari hjá oljufeløgunum at arbeiða í Føroyum. Í hesum sambandi er vigtugt at fáa dupultskattaavtalu við Bretland uppá pláss heldur stjórin á Jarðfeingi

OLJUVIRKSEMI
Jan Müller
jan@sosialurin.fo

Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Jarðfeingi: -Vit mugu gera umstøðurnar hjða oljufeløgunum at virka í Føroyum lættari og smidligari

Áðrenn Jarðfeingi fer í løgtingið við 3. útbjóðing skulu treytirnar, sum verða settar oljufeløgunum endurskoðast, og tilmæli skulu gerast til nýggju treytirnar. Sigurð í Jákupsstovu, stjóri á Jarðfeingi sigur, at tey til ta tíð fara at taka upp til viðgerðar, um nakað skal broytst í sambandi við eitt nýtt útbjóðingarumfar. Sjálvur er hann av teirri fatan, at skipanin vit hava er sum heild nokk so góð, men tað eru kanska viðurskifti, sum áttu at verið broytt, so skipanin bleiv meira praktisk at umsita.

- Men slíkt sum keikantur og skattareglur, síggi eg ikki fyri mær verður broytt. Men kanska slíkt, sum ger tað smidligari hjá oljufeløgunum at virka her. Eitt slíkt mál er manglandi dupultskattaavtalan við bretar sigur Jarðfeingisstjórin. Tað undrar hann, at hetta málið ikki er komið longuri. Jarðfeingi ætlar sær at tosa við Fíggjarmálarráðið um henda spurningin. - Øll, sum arbeiða á palli rinda skatt, men kemur ein persónur til Føroya og er her í tveir dagar, so skal hann rinda skatt. Tað er slíkt, sum vit fegnir vilja broyta.

Ikki misnøgd

Sigurð í Jákupsstovu heldur ikki sjálvur, at oljufeløgini eru misnøgd við avtalurnar og verandi skipanin. Tað er meira hetta, at tað skal vera lættari at arbeiða her. Man kann so kanska seinni meta, um tað er neyðugt at gera broytingar í skatta- og øðrum viðurskiftum, tá olja verður funnin.

Í løtuni verða fleiri metingar- og avmarkingarbrunnar boraðir hinumegin markið. Tá tað gjørdist greitt, at her varð gjørt eitt stórt fund gjørdist undirtøkan fyri 2. útbjóðing á føroyska landgrunninum stór.

Vit hava spurt stjóran í Jarðfeingi, hvønn týdning núverandi boriætlanin á Rosebankfundinum hevur fyri eina komandi 3. útbjóðing á landgrunninum. Hann váttar at Rosebankfundið hjálpti til í 2. útbjóðing, og hann sigur, at tað ger tað ikki verri, um stóra boriverkætlanin nú á Rosebankfeltinum verður væleydnað.

Herfyri segði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður í oljumálum, at brunnarnir, sum Chevron og onnur oljufeløg bora hinumegin markið í løtuni kunnu fáa alstóran týdning fyri framtíðar leitivirksemi á føroyska landgrunninum.